# Hvussu skriva vit jólakort?

## Skriva eitt jólakort til ommu og abba, gummu og gubba ella til onkran heilt annan.

**Jólakortið**
Áðrenn Snapchat, Tik Tok og Facebook vóru til, var vanligt at senda jólakort til familju og vinir og harvið ynskja teimum eini gleðilig jól og gott nýggjár.

Á jólakortið kanst tú skriva júst tað, tú hevur hug til. Tað kann t.d. vera, hvat tú gleðir teg til á jólum, hvat tú ynskir tær í jólagávu, ella hvørjum tú fert at halda jól saman við. Brúka hugflogið og tína vakrastu hondskrift.

Heiðrik á Heygum hevur teknað hetta vakra dupulta jólakortið, og tað merkir, at tað er nokk av plássi til at skriva eina ordiliga góða jólaheilsan og kanska eisini eina tekning.










**Brævbjálvin**
Tá ið tú hevur skrivað jólakortið, skal tað í ein brævbjálva. Á brævbjálvan skrivar tú bústaðin hjá henni ella honum, sum jólakortið skal sendast til. Veitst tú, hvussu vegurin eitur, har omma og abbi búgva?

Eitt frímerki má eisini setast á brævbjálvan. Frímerkið vísir, hvat tað kostar at senda brævið. Skalt tú senda eitt bræv í Føroyum, skal virðið á frímerkinum vera 23 kr., men skalt tú senda brævið til eitt annað land, skal virðið vera 33 kr.




Jólafrímerkini í ár mynda fitta jólamannin Julius í Likkudali, sum vit m.a. kenna frá sjónleiki og frá barnasendingum í Kringvarpinum fram til jóla.

Her sært tú, hvussu ein brævbjálvi kann síggja út - hvar bústaður og frímerki skal vera. Títt navn og bústaður skal standa aftanfyri við smærri bókstavum, og mælt verður til at seta ein kross útyvir, so tað ikki kemur bland í við bústaðin hjá móttakara.

Í november ber eisini til at seta jólamerki á brøv. Keyp tey á Posta og stuðla einum góðum endamáli. Les meira um jólamerkini á stamps.fo.




**Posta heintar jólakortini 27. november, og verða tey borin út 2. desember.**

# Hvussu skriva vit jólakort?

Móttakari

Dagfesting

Tú fortelur

Jólini 2024

Góðu omma og abbi

Her er eitt jólakort frá mær. Eg gleði meg so nógv at halda jól saman við tykkum.

Vit fara at dansa jólatræ og eta nógvar karamellur.

Eg havi eisini gjørt eina jólagávu til tykkum. Mamma sigur, at eg ikki má fortelja, hvat tað er.

Gleðilig jól.

heilsan
Pætur



Títt navn



# Hvussu sendi eg eitt bræv til onkran í Føroyum?

**Frammanfyri á bjálvanum:**
**Navn og bústaður hjá móttakara**



# Hvussu sendi eg eitt bræv til eitt annað land?

**Frammanfyri á bjálvanum:**
**Navn og bústaður hjá móttakara**



# Hvat skal standa aftanfyri á bjálvanum?

**Aftanfyri á bjálvanum:**
**Navn og bústaður hjá sendara**



# Hvar skal jólamerkið setast?

**Jólamerkið verður sett á bjálvan við síðuna av frímerkinum.**



# Jólamerkini 2024

**Jólamerkini hava ikki virði á, eins og frímerkini hava.**



# Hví seta jólamerki á?

**Jólamerkini hava ikki virði á, eins og frímerkini hava.**




**Jólamerkini**
Fram til jóla ber eisini til at seta eitt jólamerki á bjálvan. Eitt jólamerki líkist einum vanligum frímerki, men tað kann ikki brúkast til at rinda fyri at fáa brøv borin út – tað er bert til pynt.

Tað snilda við jólamerkinum er, at ágóðin av søluni fer til Jólamerkjagrunnin, sum stuðlar verkætlanum, ið eru til frama fyri børn og ung í Føroyum. Tað merkir, at hvørja ferð tú keypir jólamerki frá Posta, stuðlar tú einum góðum endamáli. Soleiðis kunnu næmingar eisini hjálpa børnum og ungum, tá ið tey seta jólamerki á síni jólakort. Helga Djurhuus hevur sniðgivið ársins jólamerki, sum mynda jólaklipp.

Tað ber til at taka nøkur av pappírsklippunum frá jólamerkjunum niður, printa tey út og njóta eina hugnaliga løtu við jólaklippi. Tak niður her.

Les meira um jólamerkini her.